# Alonso hóttir Formel 1

Fernando Alonso bíðar til í evstu løtu við at siga frá, um hann er við í Formel 1 kappkoyringini í 2010. Freistin fyri tilmelding er úti á midnátt í kvøld, men fyri at vera við skulu liðini góðkenna sonevnda budget-loftið, sum nú er ásett. Og hetta hevur fingið øði í Fernando Alonso. – Hjá mær er tað ikki avbjóðandi at koyra í eini veikari F1-kapping við smáum liðum. Vit ynskja kapping millum sterkastu liðini við best møguligu tøknini. Og ber tað ikki til í Formel 1, noyðist eg at leita mær avbjóðingar aðrastaðni, sigur Alonso, ið sær Le Mans sum eitt møguligt alternativ.



# Óskar vann Summarkappingina

Stór Golfkapping var seinasta vikuskfti, tá sokallaða Summarkappingin varð spæld. Har verður spælt Tvær ferðir yvir 18 hol uttan handicap. 12 spælarar tóku lut, og bestur av hesum var Óskar Eiriksson, sum nýtti 169 sløg. Andreas Hansen nýtti 184 sløg og Páll Kjærbo 188 sløg. Í dag seta Óskar Eiriksson og Janus Norðberg kósina móti Álandi, har teir skulu umboða Føroyar á Oyggjaleikunum, sum byrja um eina góða viku.



*Triðja FM-stevnan verður um vikuskiftið hildin í Kollafirðir*
*Savnsmynd*

# Startrøðin í Kollafirði

**Um vikuskiftið verður triðja FM-stevnan í kapproðri hildin í Kollafirði, har sundalagsstevnan hoyrir heima í ár. Til samans hava 47 bátar boðað frá luttøku til FM-róðurin, og hartil eru 33 barnamanningar eisini partur av róðrinum.**

Startrøðin er ásett eftir, hvussu bátarnir stóðu seg í seinasta FM-róðrinum.

**Barnaróður, dreingir**
3 Fípan Fagra
4 Kollur
5 Tambar
6 Svanur
7 Junkarin
8 Jallurin
9 Títlingur
10 Drekin
11 Títlingur
12 Frúgvin
13 Havfrúgvin
14 Bylgjan

**Barnaróður, gentur – bólkur 1**
4 Dúgvan
5 Ritan
6 Títlingur
7 Jallurin
8 Drekin
9 Ørnin
10 Frúgvin
11 Spógvin
12 Bylgjan
13 Sílið
14 Havørnin

**Barnaróður, gentur – bólkur 2**
4 Tjaldrið
5 Tekla
6 Firvaldur
7 Blikur
8 Kollur
9 Teistin
10 Royndin Fríða
11 Tambar
12 Fípan Fagra
13 Svanur

**5-mannafør, dreingir**
4 Báran
5 Ritan
6 Kollur
7 Junkarin
8 Teistin
9 Tjaldrið
10 Blikur
11 Royndin Fríða
12 Jallurin
13 Firvaldur

**6-mannafør, kvinnur**
6 Romvlvs
7 Jarnbardur
8 Páll Fangi
9 Gongurólvur
10 Sølmundur
11 Hvessingur

**5-mannafør, gentur**
5 Junkarin
6 Falkur
7 Sílið, 2 G
8 Jallurin
9 Firvaldur
10 Hvassi
11 Havfrúgvin
12 Kollur

**5-mannafør, kvinnur**
7 Ritan
8 Frúgvin
9 Erla Kongsdóttir
10 Hvassi
11 Blikur

**6-mannafør, menn**
4 Kollfirðingur
5 Jarnbardur
6 Skúgvur
7 Sundabáturin
8 Riddarin
9 Tvørábáturin
10 Smyril
11 Gongurólvur
12 Rádni
13 Hósvíkingur
14 Romvlvs

**8-mannafør**
7 Knørrur
8 Árnfirðingur
9 Argjabáturin
10 Ørvur

**10-mannafør**
8 Klaksvíkingur
9 Eysturoyingur
10 Ormurin Langi RK

**FM-kappróður**

| | | |
|---|---|---|
| | **5-mannafør, dreingir** | **Stig íalt** |
| 1 | Tjaldrið | 14 |
| 2 | Blikur | 10 |
| 3 | Junkarin | 10 |
| 4 | Teistin | 9 |
| 5 | Royndin Fríða | 7 |
| 7 | Kollur | 3 |
| 8 | Havfrúgvin | 3 |
| | **6-mannafør, kvinnur** | |
| 1 | Gongurólvur | 14 |
| 2 | Páll Fangi | 11 |
| 3 | Sølmundur | 11 |
| 4 | Jarnbardur | 7 |
| 5 | Hvessingur | 7 |
| 6 | Romvlvs | 4 |
| | **5-mannafør, gentur** | |
| 1 | Firvaldur | 13 |
| 2 | Jallurin | 13 |
| 3 | Hvassi | 7 |
| 4 | Sílið | 7 |
| 5 | Havfrúgvin | 8 |
| 6 | Falkur | 6 |
| 7 | Katla | 1 |
| | **5-mannafør, kvinnur** | |
| 1 | Erla Kongsdóttir | 14 |
| 2 | Frúgvin | 12 |
| 3 | Hvassi | 10 |
| 4 | Ritan | 8 |
| 5 | Blikur | 6 |
| | **6-mannafør, menn** | |
| 1 | Tvørábáturin | 13 |
| 2 | Riddarin | 13 |
| 3 | Smyril | 10 |
| 4 | Gongurólvur | 7 |
| 5 | Skúgvur | 5 |
| 6 | Sundabáturin | 4 |
| 7 | Rádni | 3 |
| 8 | Jarnbardur | 1 |
| | **8-mannafør** | |
| 1 | Argjabáturin | 14 |
| 2 | Árnfirðingur | 6 |
| 3 | Ørvur | 11 |
| 4 | Knørrur | 9 |
| | **10-mannafør** | |
| 1 | Eysturoyingur | 14 |
| 2 | Klaksvíkingur | 12 |



*Tað verður ókeypis atgongd, tá manslandsliðið rundar EM-undankappingina av við heimadysti móti Bosnia-Herzegovina leygardagin*

# Ókeypis landsdystur

**Tórshavnar Kommuna bjóðar til ókeypis tophondbólt, tá manslandsliðið leygardagin spælir seinasta dystin í EM-undankappingini**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Leygardagin klokkan 18 spæla føroysku hondbóltsmenninir móti Bosnia-Herzegovina í Ítróttarhøllini á Hálsi í Havn.

Ein av fortreytunum fyri at spæla EM-undankappingardystirnar var, at hetta kundi gerast á gólvi, sum einans er merkt til hondbóltsdystir, og hetta bar til, tá Tórshavnar Kommuna valdi at gera íløgur í gula gólvið, sum hevur verið nýtt til landsdystir og steypafinalurnar.

Og nú Tórshavnar Kommuna heldur 100 ára hátíðarhald í hesum døgum, verður hondbóltslandsdysturin móti Bosnia-Herzegovina eisini partur av hesum.

Fyrradagin boðaði Kommunan nevnliga frá, at avgerð er tikin um, at ókeypis atgongd verður til dystin. Hetta á tann hátt, at kommunan rindar Hondbóltssambandinum fyri tey atgongumerki, sum áskoðarin annars skuldi goldið fyri.